listastevna føroya arts festival

# Ordiligt stand-up

**Norskt, fúlt og ógvuliga stuttligt stand-up show í Norðurlandahúsinum**

UMMÆLI
*Heri á Rógvi*


*Shabana Rheman fekk føroyingar at flenna hóskvøldið*

*Mynd: Heri á Rógvi*

Tað snúði seg um muslimar, perkarar, jomfrúhind, forhúð, kynsgøgn, endatarmar, Norra og nógv annað, sum eitt stand-up show vanliga hevur at bjóða.

Stand-up er eftir øllum at døma vorðin til listagrein í Føroyum, tá tað er ein norskur pakistanari sum Shabana Rheman, ið framførir. Hetta er nú nóg gott til hægsta listarliga tind á Føroya landi, Listastevnuna. Tú fært varhugan av, at tað á ein ella skal rættvísgerast, at tú tekur nakað við, sum í roynd og veru fyri tað nógva er fúlt undirhald. Men hetta er nakað fólki dámar. Og í hesum ummælinum halda vit, at tað er júst tað Listastevnan vantar – tað fólksliga. Stevnan er í so nógv stongd inni í Norðurlandahúsinum og ikki ein partur av dagligdegnum og dagliga prátinum hjá fólki. Tómu stólarnir til flest øll tiltøk bera boð um eina fjarstøðu millum fasta og mentaða kompaníið í norðurlendska húsinum og lívið uttanfyri.

Hóskvøldið var tað stuttligt – ordiliga stuttligt. Hóast tilstaðar var tann heilt feiti boðskapurin var so sum so at fáa eyga á, men tað var stuttligt. Tað var rátt við dagligum slang máli, sum er ein stórur partur av stílinum.

Í Føroyum eru næstan eingir perkarar, men vit flenna allíkavæl eftir øllum vittigheitunum um teir. Soleiðis tók ein áhoyrari til, og tað er væl eisini kjarnin í øllum hesum við skemti og stand-up. Tú mást á ein ella kunna kenna teg aftur í tí, tú skal flenna at. Men at skilja, hví tey í einum parti av Norra eru meira hetta ella hatta enn hini, var í støðum heldur torført. Men perkararsøgurnar nýttu tey í salinum.

Og sum ofta til tílík show fekk eisini ein ávísur áskoðari, sum er so óheppin at siga í fremstu røðunum, toyggið frá Shabanu – meira enn eina ferð. Til síðst varð hesin eisini drigin upp á palli, har hann og Shabana endaðu undir muslimska klædnabúnanum – »burka«. Eisini dugdi hon væl at gera gjøldur burturúr sær sjálvum, sum ikki minst er vanligt í stand-up. Tað er eitt sindur ringt at siga frá øllum, tí skemti riggar nú betri á palli enn á prenti. Og avgjørt kundi stand-up verið áhugavert at síggja meira til.

Fyri 225 krónur vilja vit eisini flenna, og tað gjørdu tey flestu nógv, men kortini 225 ferðir ella líkavið. Tí ikki toppkarakter ella hábærslig lýsingarorð. List ella ikki list, so var tað stand-up, sum tað eigur at vera.

# Triðja hvørt setur tómt

**Eitt av trimum setrum á rutunum millum Føroyar og Danmark eru tóm. Serliga februar og november mánaði eru lítið hugaligir hjá flogfeløgunum**

FLOGFERÐSLA
*Heri á Rógvi*

Ruturnar millum Føroyar og Danmark eru eisini loftferðslurutur, har kapping er millum tveir veitarar.

Tøl, sum Sosialurin hevur fingið upplýst ymsastaðni frá, vísa, at í 2002 vóru umleið. 197.000 retur setur til Danmarkar og 131.476 ferðafólk sótu í setrunum. Tað vil so siga, at triðja hvørt setur er tómt á rutunum til Føroya.

### Serliga í februar og november

Skilið er serliga ringt í mánaðunum februar og november. Summarfrítíðin og jólafríðin eru góðir dagar hjá flogfeløgunum. Viðmerkjast skal eisini, at í tíðarskeiðum er eftirspurningurin væl størri til Føroyar enn hinvegin ella øvugt.

Eftir hvat vit hava fingið uppspurt, so eigur Atlantic Airways á leið 57% av marknaðinum, og Maerks-Air hini 47%. Tað eru bert hesir báðir veitararnir, sum hava loyvi at flúgva til og úr Føroyum.

### Ikki tíð

Tað hevur gingið illa í hond at fáa viðmerkingar frá Atlantic Airways og Maersk-Air. Bæði Magni Arge, stjóri fyri Atlantic Airways, og Keld Mosgaard Christensen, varastjóri hjá Maersk-Air, høvdu ikki stundir at tosa við blaðið áðrenn evstamark.

# Atlantic einsamallir um politikkin

**Arbeiðsbólkurin, sum skal orða nýggjan loftferðslupolitikkin, er bert mannaður við umboðum fyri Atlantic Airways og Vinnumálaráðið**

LOFTFERÐSLA
*Heri á Rógvi*


*Saman við umboðum fyri Vinnumálaráðið eru nevndarformaðurin og stjórin í Atlantic Airways einastu umboðini í einum bólki, sum er settur at gera tilmæli til nýggjan loftferðslupolitik*

*Savnsmynd*

Landsstýrismaðurin í flogferðslumálum, Bjarni Djurholm, hevur sett ein bólk at arbeiða við at orða ein nýggjan loftferðslupolitikk. Orsakað av serliga broytingum í manningini hjá Vinnumálaráðnum er glið ikki komið á arbeiði enn. Men manningin í bólkinum gevur ein sterkan fyrimun til Atlantic Airways.

Tað er nevniliga soleiðis, at manningin í dag telir stjóran í Atlantic Airways, Magna Arge, og nevndarformannin, Christian Andreasen.

Hesar upplýsingar hava vit fingið frá Vinnumálaráðnum.

Marita Danielsen, forkvinna í Ferðaráð Føroya, var eisini partur av bólkinum, men eftir fyrsta fundin tók hon seg úr bólkinum. Formaðurin fyri nevndina er í skrivandi stund Niels Winther, fulltrúi í Vinnumálaráðnum. Niels Winther upplýsir, at tað av fyrstan tíð bert var Christian Andreasen, sum var umboð fyri Atlantic Airways í arbeiðsbólkinum, men føroyska flogfelagið helt tað vera skilabest, um Magni Arge sum stjóri eisini kundi vera við í arbeiðsbólkinum, og hesum tók Vinnumálaráðið undir við.

Niels Winther leggur afturat, at tá arbeiðsbólkurin hevur gjørt sítt tilmæli, fer tað til hoyringar hjá øllum viðkomandi pørtum.

### Ikki Finnbogi

Ætlanin hjá Vinnumálaráðnum var, at Finnbogi Niclasen, stjóri á Ferðaráð Føroya, skuldi taka yvir eftir Maritu Danielsen, men hetta gjørdist av ongum, tí danska ferðslumálaráðið ikki vildi ganga við til hetta.

Bjarni Djurholm sigur seg undrast nógv um, hví ferðslumálaráðið ikki vil loyva hesum.

Teir vilja ganga við til yvirtøkur av flogvøllinum, men ikki at vit manna arbeiðsbólkin, sigur Bjarni Djurholm.

Enn eru ikki allar súðir syftar, men sum er sleppur Finnbogi ikki upp í part.

### Kanska ov snævur

Bjarni Djurholm ásannar, at arbeiðsbólkurin kanska er ov snævur samansettur.

– Tað er møguligt, at hann fær eina øðrvísi breidd, sigur Bjarni Djurholm, sum kortini ikki vil útgreina, hvat øðrvísi breidd merkir.



# Sakførari í báðum pørtum

**Løgfrøðingurin, sum Fiskimálaráðið hevur valt sær at føra eitt møguligt rættarmál um veiðiloyvið hjá Jógvani S, hevur alment boðað frá, at hann er ivasamur um ta avgerð, hann vegna Fiskimálráðið skal verja**

UMSITING
*Edvard Joensen*


*Halgir Winther Poulsen skal vera sakførari hjá Fiskimálaráðnum í einum møguligum rættarmáli um veiðiloyvið hjá Jógvani S. Hóast hann sigur seg vera ivasaman um avgerðina hjá landsstýrismanninum, hann skal verja*

Tað verður Halgir Winther Poulsen, løgfrøðingur, sum skal føra eitt møguligt rættarmál fyri Fiskimálaráðið, um so verður, at reiðaríið hjá Jógvani S stevnir eftir endurgjaldi, sigur Jacob Vestergaard, landsstýrismaður við fiskivinnumálum. Sjálvur sigur Halgir Winther Poulsen, at tað veit hann einki um.

Tað er ikki ókent fyri almenninginum, at Halgir Winther Poulsen er ivasamur um, hvørt tað er rætt at taka veiðiloyvið hjá Jógvani S aftur. Er tað so ikki óheppið, at Fiskimálaráðið velur sær ein sakførara, sum kanska er í parti við mótpartinum?

– Nei, heldur Jacob Vestergard, landsstýrismaður við fiksivinnumálum. Tað haldi eg ikki. Halgir Winther Poulsen er royndur løgfrøðingur, og hann fer at føra sakina fyri okkum. Annars fer rætturin at taka støðu út frá tí, sum har kemur fram, og einki er at ivast í, at øll tey skjøl, sum finnast í málinum, fara at verða løgd fram har. Dómstólurin er óvildigur, so har síggi eg ongan vanda, sigur Jacob Vestergaard.

Annars heldur landsstýrismaðurin, at tað er ikki vist, at tað ber til at finna nakran løgfrøðing, sum er púra samdur við landsstýrismálanevndini.

Halgir Winther Poulsen hevur ikki aðrar viðmerkingar til upplýsingarnar hjá landsstýrismanninum enn, at hann sigur seg ikki vita nakað um, at hann skal vera sakførari hjá Fiskimálaráðnum.

Jógvan S fiskar enn, og tað undrar fleiri fólk. Tí tann nógv umtalaða tilsøgnin um veiðiloyvi var skjót at avgreiða, men nú boðað er frá, loyvið verður tikið aftur, gongur seinni, vísa fleiri keldur á.

Jacob Vestergaard, landsstýrismaður við fiskivinnumálum, sigur, at hann eisini hevur fingið spurningin um, hví so er. Og hann vísir til fyistingarlógina.

–Tað er soleiðis, sigur hann, at tá eitt slíkt skriv fer út, skal móttakarin hava eina viku hoyringsfreist. Og til tann freistin er farin, er ikki rætt at taka loyvi aftur. Í mínari verð ger tað ongan mun, um skipið fiskar eina viku meira ella minni, sigur hann.

Hann greiðir frá, at skrivið til reiðaríið er dagfest á Fiskimálaráðnum tann 14. august og skuldi sostatt verið reiðarínum í hendi dagin eftir. Síðan hevur reiðaríið fingið ta vikuna at umráða seg í, áðrenn svarað verður aftur upp á hetta skrivið, sigur landsstýrismaðurin.

Hann sigur, at tað er gjørt soleiðis í Fiskimálaráðnum eftir at tey hava ráðført seg við Halgir Winther Poulsen, sakførara. Hann var annar teirra, sum av Fiskimálaráðnum varð biðin um at kanna málið fyri Fiskimálráðið. Og nú roknast kann við einum rættarligum eftirspæli, hevur fiskimálaráðið biðið Halgir Winther Poulsen um at vera sakførara hjá sær.

# Kingo guðstænasta í Hvalvík


*Guðstænastan í Hvalvíkar kirkju í morgin verður sum í gomlum døgum, tá alt varð sungið uttan orgulfylgispæl*

**Guðstænastan í Hvalvíkar kirkju í morgin verður heldur øðrvísi, enn hon vanliga plagar at vera. Allir sálmarnir verða á donskum og sungnir við gomlu Kingoløgunum**

GUÐSTÆNASTA
*Edvard Joensen*

Hvalvíkingar og øll onnur, sum hug hava at fara í kirkjum í Hvalvík í morgin, hava høvi at uppliva eina guðstænastu, sum víkir frá tí vanliga. Orglið er tagnað, og bara Kingosálmar uttan undirspæl verða at hoyra.

Hvalvíksprestur, Mogens Tilsted Christensen, sigur, at tað er í samband við listastevnuna, at hendan øðrvísi guðstænasta verður hildin.

Sum so verður guðstænastan at fara fram eftir vanligum leisti annað enn tað, at orglið verður ikki brúkt. Bæði præludium og postludium verða eisini sungin av Kingobólkinum í Tjørnuvík, sum eisini fer at standa fyri sálmasanginum gjøgnum alla guðstænastuna.

Guðstænastan verður sum í gomlum døgum, sigur prestur. Sjálvur tosar hann bara danskt, sigur hann. So har veðru alt á donskum uttan kanska inn- og útgangsbønin.

Sálmarnir verða framførdir á gomlum donskum máli, sum teir vórðu yrktir á. Løgini er eisini tey upprunaligu, greiðir prestur frá. Og tá nú Hvalvíkar kirkja er tann elsta av gomlu flagtaktu trækirkjunum í Føroyum, er tað eitt sera passandi umhvørvi at hava eina slíka guðstænastu í, sigur Mogens Tilsted Christensen, prestur í Hvalvík.


## Almenn móttøka

Tann 31. juli 2003 fór Napoleon Nólsoy frá fyri aldur sum skúlastjóri í Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúla og í Tórshavnar Musikkskúla.

Í hesum sambandi verður almenn móttøka í Müllers Pakkhúsi fríggjadagin 22. august kl. 16-18.

**Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli og Tórshavnar Musikkskúli**